Kappingareftirlitið

P/f Framholding
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður

Att. Niels Winther Poulsen

Tórshavn, tann 16-12-2025

Viðv. mál nr.: 25/00581

Kappingareftirlitið fekk tann 25. november 2025 eina einfalda fráboðan, sbrt. § 17, stk. 2, í kappingarlógini, um at P/f Framholding ætlar at yvirtaka ognarlutin hjá Kaldbakur ehf í P/f Fjørður. Keypið er treyta av at Kappingareftirlitið góðkennir yvirtøkuna, sbrt. sølusáttmálanum.

Tá Kappingareftirlitið fær eina fráboðan um eina samanlegging, skal Kappingareftirlitið geva boð um nær fráboðanin er at meta sum fullfíggjað, sbrt. § 17, stk. 5, í kappingarlógini.

Tá fráboðanin um fullfíggjað fráboðan er latin fráboðara, hevur Kappingareftirlitið 30 yrkadagar til at taka avgerð um hvørs samanleggingin skal góðkennast eftir einfaldari málsviðgerð, ella um samanleggingin skal kannast nærri, sbrt. § 18, stk. 1, í kappingarlógini.

Kappingareftirlitið gav fráboðara fráboðan um fullfíggjaða fráboðan tann 08.12.2025 og skal seinast tann 16.01.2026 taka avgerð um hvørs samanleggingin skal góðkennast eftir einfaldari málsviðgerð, ella um samanleggingin skal kannast nærri, sbrt. § 18, stk. 1, í kappingarlógini.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini. Ein samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 2 er *"tá ið ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ið ein ella fleiri fyritøkur við keypi av pørtum ella ognum gjøgnum avtalu ella á annan hátt fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat."*

Samanleggingin skal fráboðast tí tær luttakandi fyritøkurnar samanlagt hava ein árligan umsetning á í minsta lagi 75 milliónir krónur í Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning upp á 15 milliónir krónur í Føroyum, sbrt. §14, stk. 1 í kappingarlógini.

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, tí fyritøkurnar ikki eru virknar á sama vøru- og landafrøðiliga marknað í Føroyum, sbrt. § 3, stk. 1, nr. 3, í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025 um samanleggingar.

P/f Framholding er eitt holding felag, sum fæst við íløgum í øðrum feløgum. P/f Framholding eigur Sp/f Framherja, sum er virki innan fiskivinnu, og rekur trolara, nótaskip og línubátar. Eisini eigur felagið helvtina av flakavirkinum P/f Faroe Origin. Harumframt er felagið virkin sum minnilutaeigari í øðrum feløgunum, m.a. P/f Krafta, Globe Tracker, P/f Pelagos og P/f Grant.

Kaldbakur ehf er eitt íslendskt íløgufelag, sum fast við íløgum í skrásettum og óskrásettum feløgum, serliga í Íslandi og Noregi. Eftir yvirtøkuni hevur Kaldbakur ehf einki virksemi í Føroyum.

Yvirtøkan er skipa á tann hátt, at P/f Framholding yvirtekur ognarlutin hjá Kaldbakur ehf í felagnum P/f Fjørður, fyri eina upphædd á [...] kr. Við keypinum fær P/f Framholding ræðið á P/f Fjørður.

Kappingareftirlitið hevur í sínum eftirlitsarbeiðið ikki orsøk til at halda, at fráboðaða samanleggingin munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu.

Kappingareftirlitið hevur tí, við heimild í § 15, stk. 7, í kappingarlógini, tikið avgerð um, at góðkenna keypið hjá P/f Framholding av ognarlutinum hjá Kaldbakur ehf í P/f Fjørður, vísandi til § 15, stk. 2, í kappingarlógini, um at ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Góðkenningin er treyta av at upplýsingarnar, sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum, eru rættar, sbrt. § 20, í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Teitur Friduson Andreasen
Fulltrúi